Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Rørslutarnað og Bygdaleiðir

Spurningar:

1. Eru allir bussarnir hjá Bygdaleiðum í dag útgjørdir við lyftu, soleiðis at fólk við koyristóli kunnu brúka almenna busskoyring á øllum leiðum?
2. Eru bussteðgistøðini, har bussarnir hjá Bygdaleiðum steðga, gjørd klár til at m.a. koyristólar kunnu koyra úr og í bussarnar?

Viðmerkingar:
Á heimasíðuni hjá Bygdaleiðum stendur slagorðið “Nýggjari, grønari og rúmligari”. Hetta eru góð slagorð, sum eiga at betra um tænastuna hjá øllum borgarum í landinum, sum nýta almennu bussleiðirnar. Undirritaði hevur fyrr havt fyrispurningar um atkomuviðurskiftini hjá rørslutarnaðum í almennar bygningar. Har varð staðfest, at enn er nakað á mál, áðrenn allir almennir bygningar lúka krøvini um atkomu fyri fólk við rørslutarni. MEGD hevur eisini víst á hetta fleiri ferðir.

Tað er tí gleðiligt, at allir bussar hjá Bygdaleiðum eru bæði nýggjari, grønari og rúmligari. Men spurningurin er, um umstøðurnar at koma í og úr bussunum eru nóg góðar allastaðni, og um bussarnir eru gjørdir klárir til, at koyristólsbrúkarar kunnu nýta bussleiðina. Greitt er, at undirlendið, har koyristólar skulu úr og í bussar, eigur at vera rúmligt og slætt, og spurningurin er, um hetta er veruleikin á øllum bussteðgistøðum. Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 24. august 2021

Jóhannis Joensen